UTTAN ÚR HEIMI




*Reiðaríið BC Ferries átti „Queen of the North“.*

# Drotningin sakk

**Bæði ferðafólk og manning vórðu bjargað, tá kanadiska ferjan »Queen of the North« sakk**

SJÓFERÐSLA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Enn veit eingin við vissu, hví tann 125 metrar langa ferjan sakk nærhendis oynni Gil Island úti fyri kanadisku vesturstrondini, men ferðafólk hava greitt frá, at tey hoyrdu ein hvøllan brest, stutt áðrenn skipið tók at søkka.

Reiðaríið kunngjørdi í gjár, at øll tey 99, sum vóru við „Queen of the North“, vóru bjargað, men seinni bleiv fráboðað, at ivi kortini var um tvey ferðafólk. Gerald Foisey og Shirley Rosette høvdu keypt ferðaseðil, men tað er óvist, um tey nakrantíð fóru umborð á skipið. Ein møguleiki er, at tey vóru við, og at tey vórðu bjargað, men at tey vóru farin, áðrenn reiðaríið fekk stundir at skráseta tey.

»Queen of the North«, sum tók 700 ferðafólk og 150 bilar, sigldi ímillum Vancouver, Seattle og Alaska.

# 24 milliónir eru flóttafólk í egnum landi

**Kríggj og ágangur hava noytt 24 milliónir fólk at flýggja frá húsi og heimi. Tey eru flóttafólk í egnum landi**

FLÓTTAFÓLK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ringast stendur til í Sudan, har umleið fimm milliónir fólk eru noydd ella rikin frá húsi og heimi, so tey nú noyðast at liva sum flóttafólk í stórum í legum í teirra egna landi. Orsøkin er fyrst og fremst tað blóðuga stríðið í landspartinum Darfur, sigur ST, sum júst hevur almannakunngjørt eina frágreiðing um flóttafólk í 50 londum.

Næst eftir Sudan er Kolombia, har ST metir, at 3,7 milliónir fólk liva sum flóttafólk. Í Uganda er talið tvær milliónir, og í Demokratiska Lýðveldinum Kongo eru 1,7 millión fólk flóttafólk. Í Irak hevur ófriðurin rikið umleið 1,3 millión irakar frá húsi og heimi. Tilsamans eru 24 milliónir fólk, sum liva sum flóttafólk í egnum landi, og í flestu førum eru tað teirra egnu landsmenn, sum hava rikið tey heiman. Talið umfatar ikki tey, sum eru flýdd til onnur lond.

– Telja vit tey uppí, er talið á teimum, ið liva sum flóttafólk, umleið 36 milliónir, sigur Tomas C. Archer, aðalskrivari í Flóttafólkahjálpini, við tíðindastovuna ANB. Hann sigur, at talið er nakað minni enn fyri einum ári síðani, men at tað kortini er óhugnaliga stórt, serliga tá hugsað verður um ta viðferð, nógv flóttafólk fáa.

## Vit oyða náttúruna

Seinastu 65 milliónir árini hevur mennsikjan ongantíð oytt so nógv djóra- og plantusløg sum í hesum tíðum.

Á havbotninum hvørva koralrivini, og á landi minkar frumskógurin í hvørjum. Samstund hvørva fleiri djórasløg, og tað er menniskjan, sum hevur skyldina, sigur ST. Rætt er tað, at djóra- og plantusløg eru horvin fyrr, men tað var ikki av mannaávum, skrivar Politiken. Serfrøðingar siga, at fleiri djóra- og plantusløg vórðu útruddað fyri ávikavist 65, 205, 250, 375 og 440 milliónum árum síðani, men tær ferðirnar hendi tað av eldgosum, samanstoytum millum Jørðina og stórar rúmdarsteinar og og stórum veðurlagsbroytingum.

Í dag er øðrvísi, sigur ST og vísir á, at nú eru tað dálking, skjótt veksandi býir og tann veksandi hitin á Jørðini, sum gera enda á djóra- og plantusløgum í heimshøvunum og á landi.

## ES vrakar flogfeløg

ES-nevndin hevur sett næstan hundrað flogfeløg á svartalista, tí tey lúka ikki tey ásettu trygdarkrøvini.

Nógv tey flestu feløgini eru skrásett í afrikonskum londum, og ikki færri enn 50 eru úr Demokratiska Lýðveldinum Kongo. Harafturat eru 13 í Sierra Leone, ellivu í Guinea, seks í Swazilandi og trý í Liberia. Onnur feløg eru í Kasakhstan, Afghanistan, Norðurkorea og Teilandi.

ES-nevndin sigur, at flogførini hjá feløgunum fáa ikki tað neyðuga viðlíkahaldið, og at eftirlitið er heldur ikki nóg gott, og tí verða feløgini standandi á listanum, til viðurskiftini eru fingin í rættlag.

ES-nevndin ger vart við, at tað eru fáir evropearar, sum flúgva við hesaum flogførunum.

## Frp. 30% av atkvøðunum

Hevði stórtingsval verið í Noregi nú, hevði næstan triði hvør norðmaður atkvøtt fyri Framburðsflokkinum.

Eftir einari nýggjari meiningakanning hevði Framburðsflokkurin fingið 29,7 prosent av atkvøðunum, var val nú. Tað er 2,9 prosentstig meiri enn í seinastu kanningini, og samstundis vísir tann nýggja kanningin, at veljararnir hjá Framburðsflokkinum svíkja ikki flokkin líka ofta sum veljarar hjá hinum flokkunum.

Hóast ta stóru framgongdina hjá Framburðsflokkinum hevði Arbeiðaraflokkurin framvegis verið tann størsti, um val var nú. Flokkurin hjá Jens Stoltenberg, forsætisráðharra hevði mist 0,3 prosentstig samanborið við seinastu kanning og hevði fingið 32,2 prosent. Teir báðir flokkarnir eru nógv teir størstu, tí tann triðstørsti, Høgra, hevði fingið 14,2 prosent.

## Gírigur ríkmaður

Hóast svenska ríkmanninum Ingvard Kamprad ikki nýtist at venda hvørjari krónu, er hann sera gírigur, og nú sigur hann seg eisini vera stoltan av at hava hendan eginleikan.

Ingvar Kamprad stovnaði ta kensu handilsfyritøkuna Ikea. Sambært almennum upplýsingum eigur tann ríki sviin einar 170 milliardir krónur og er fjórðiríkasti maður í heiminum. Men tað sæst ikki á honum. Í sveisiska býnum Lausanne, har hann býr, koyrir hann vanliga í einum 17 ára gomlum Volvo, og fólk siga seg dagliga síggja hann í teimum handlunum, sum hava tær bíligastu vørurnar.

Men hann kann eisini koyra hondina niður í lumman viðhvørt. Herfyri gav hann einum listarskúla í Lausanne góðar tvær milliónir krónur, men tað merkir ikki, at fleiri kunnu vænta sær gávur av hesum slagnum.

– Eg eri gírigur, og eg eri stoltur av tí, sigur Ingvar Kamprad við eitt blað í Sveis. Tað er annars sjáldsamt at síggja tann ríka svian í fjølmiðlunum, tí hann er avgjørt ikki tann, sum rennur aftan á fjølmiðlafólkinum, skrivar AP úr Lausanne.